

*Bilernes Hus verður eitt komplett bilunivers og ein uppliving fyri ein hvønn biláhugaðan*

# Største bilhús í Evropa

**Í danska bilbýnum Silkeborg er spakin settur í til største bilhús av sínum slag í Evropa. Talan er um "Bilernes Hus", sum verður ein sølumiðstøð við 1.000 nýggjum og brúktum bilum**

BILHÚS
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Silkeborg hevur í mong ár verið róptur "Bilernes by", tí býurin er kendur fyri sínar nógvu bilhandlar. Fólk ferðast úr øllum landinum til Silkeborg at hyggja eftir stóra úrvalinum av bilum, serliga brúktum bilum.

Nú er so ætlanin at byggja største bilhús í Evropa í Silkeborg. Talan verður um eina 38.500 fermetra stóra sølumiðstøð. Samlaða íløgan verður upp á 300 milliónir krónur.

Húsið, ið skal rúma 1.000 bilum og 160 starvsfólkum, verður eftir ætlan klárt at taka í brúk við árskiftið 2005/2006.

Í húsinum verður søla av nýggjum og brúktum bilum av so gott sum øllum bilmerkjum, eisini verður bilútleigan, biltrygging, bilfígging, rustviðgerð, dekkservice, ein supermodernaður bilverkstaður, og ein stór eykalutagoymsla.

Holger Helle, frá Helle Auto A/S, ið er ein av kendastu bilsølumonnum í Danmark og ein av stigtakarunum til "Bilernes Hus", sigur, at húsið verður eitt komplett bilunivers og ein uppliving fyri ein hvønn biláhugaðan.

## Focus á fyrsta plássi




Nýggjastu krasjtestirnar hjá EuroNCAP vísa, at nýggi Ford Focus, sum var vístur fram á fyrsta sinni í Føroyum í januar 2005, fekk 34 stig og kom á fyrsta plássi við 5 stjørnum fyri sín eginleika at tryggja førara og ferðandi í einum møguligum samanstoyti, ella um bilurin verður ákoyrdur frá síðuni.

34 stig er tað mesta ein bilur í miðflokkinum nakrantíð hevur fingið í eini EuroNCAP roynd og betri úrslit enn aðrir bilar í bæði minna og størra miðalflokkinum.

Ford Focus C-Max er áður viðursløntur fyri at vera ein ovurviðkvæmisvinarligur bilur, og nú hevur so tann nýggi Focus fingið somu viðurlsøn. Tað er týska fyritøkan TUV, sum kannar í hvussu stóran mun ein bilur er førur fyri at sálda skaðilig evni frá í kabinuni.

Mille Miglia koyringin:

# VW boblan stóð seg væl í 1955

**Fyri 50 árum síðan skrivaði ein VW bolba (Type 1) søgu við at luttaka í kappkoyringini Mille Miglia í Italia, har nógvir av heimsins skjótastu sportsvognunum luttóku. Bilurin bleiv nr. 43 av 275 bilum, sum fullførdu kappingina**




*Í dag luttaka bæði VW New Beetle og gamla VW boblan á líka fóti í Mille Miglia kappingunum í Italia*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Frá 1927 til 1957 var kappkoyringin "Mille Miglia" í Italia ein koyring, har nógvir av heimsins kvikastu og skjótastu sportsvognunum luttóku.

Í 1955 luttók ein luftkøldur fólkvognur, ið bleiv nummar 43 og nummar 3 í sínum klassa. 374 bilar vóru við í kappingini, har av 275 fullførdu kappingina. Gamla VW boblan var ikki nakar sportsbilur, men hann varð hóast alt framman fyri 232 aðrar sportsbilar.

Í dag er Mille Miglia kappingin mest fyri biláhugaðar úr øllum heiminum og ikki einans fyri sportsbilar burturav. Hóast stóra aldursmunin kunnu bæði gamla VW boblan og VW New Beetle luttaka á líka fóti.

*Kelda: Bil Snak*